

## Flemming Raben skal venja H71

Fyri tað nógva hava menninir havt rúmligastu karmarnar í H71, men kvinnur hava tó eisini havt sítt pláss í felagnum. Seinnu árini er arbeiðið hesum viðvíkjandi vorðið alt meira miðvíst, og í fjør gjørdist felagið nummar eitt í 1. deild. Nú tykist felagið veruliga vilja seta ferð á menningina av unga liðnum. At standa fyri hesum hevur H71 fingið Flemming Raben, sum er ein av best umtóktu venjarunum í landinum. Arbeiðsuppgávur uttanlands hildu honum í fjør frá at venja nakað lið fast, men innan landsliðsarbeiðið hevur hann tó framvegis havt ein virknan leiklut. Og hann var annar av venjarunum, tá kvinnulandsliðið í vár tók lut í Challenge Trophy kappingini í Bosnia.

## Tyson vil boksa ímóti konufólki

Fyrrverandi heimsmeistarin í boksing Mike Tyson fer fríggjadagin undir eina boksiferð, har hann fer at boksa dystir sum show. Á tíðindafundi í gjár legði hann upp til, at hann skuldi boksa ímóti einum konufólki. Hann sipaði til boksistjørnuna Ann Wolfe og segði, at dysturin teirra millum skuldi bara vera til stuttleika. Umboðsmaðurin hjá Ann Wolfe hevur svarað, at hetta kemur als ikki upp á tal. Hon fer ikki at boksa ímóti einum manni, sum vigar 35 kilo meira enn hon.

# Tamur dystur við fýra málum

*B36*

*Skála*

**Tað var ein ógvuliga tamur dystur áskoðararnir vóru vitni til í Gundadali í gjár. Skála hevur onki at spæla og B36 hevði timburmenn, og tað setti sín dám á dystin, sum kortini endaði við at liðini bæði fingu tvey mál í part**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*B36 og Skála skoraðu tvey mál í part og fingu eitt stig í part í dystinum í Gundadali í gjárkvøldið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var turt, men býtandi kalt og eitt lítið lot lá eftir ovara vølli í Gundadali í gjárkvøldið. Tað sást eisini aftur á áskoðarafjøldini, tí tey vóru ógvuliga fá, sum høvdu funnið sær leiðina í Gundadal.

Dysturin var eisini ógvuliga lítið undirhaldandi. Gaman í, liðini byrjaðu bæði við sterkastu manning, men tað var koyrt í triðja geari allan dystin, uttan tá Skála seinastu løtuna trýsti á speedaran eina løtu.

### Linligt áðrenn steðgin

Heimaliðið var nokk oman á í fyrra hálvleiki. Teir høvdu eini tveir minni kjansir, áðrenn Fróði Benjaminsen kundi lagt B36 á odda, tá lítil hálvur tími var spældur, eftir frálíkt uppspæl frá Jóhan V. Gunnarsson, men skotið hjá toftamanninum fór upp um málið.

Í 32. minutti riggaði tó betur hjá Fróða. Sylla vann ein nærdyst inni í feltinum, men Vlada Filipovic hálvbjargaði hálvkiksaða skotinum frá Sylla, og so var Fróði kvikur og prikaði bóltin inn.

B36 hevði nú fingið eitt mál uttan at trýsta so øgiligt, og Skála hevði illa nokk havt nakað skot á málið hjá Jákup Mikkelsen.

Tvær royndir høvdu teir tó. Tá hálvur var farin spældi Alexandur Johansen Nenad Stankovic leysan. Ein frágera góð sending sum splittaði alla B36 verjuna, men Jákup Mikkelsen bjargaði væl skotinum frá serbanum.

Næsta royndin var beint fyri hálvleik, men bóltorin varð bjargaður á strikuni eftir hornaspark.

### Lívligur endi

Seinni hálvleikur var eisini keðiligur. B36 byrjaði tó bragdliga og fekk tríggjar stórar kjansir tríggjar teir fyrstu minuttirnar, men so hendi ikki meiri fyrr enn tað restaði eitt korter av dystinum.

Jóhan V. Gunnarsson vann bóltin í vinstru síðu og streyk avstað niðaneftir vøllinum. Á vegnum nýtti hann Santos sum banda, áðrenn hann legði eina framúr sending tvørtur um vøllin til Berg Midjord, sum lætt legði bóltin í tóma málið. Eitt flott mál frá B36, sum vinstri bakkurin átti størstu æruna av.

Nú trúðu tey flestu, at B36 fór at trilla sigurin heim, men so var ikki. Skála gav bóltin upp og skoraði beinanvegin.

Innskifti Debus Danielsen legði eina super sending til Boga Gregersen, sum gjørdist púra leysur. Jákup Mikkelsen kemur út at verja fyri, men Bogi lyftir bóltin væl upp um landsliðsmálverjan og minkar um leiðsluna.

Hetta kom púra dátt við hjá B36 og nakrar minuttir seinni javnaði Skála. Málverji og verjuleikari kunnu ikki semjast um hvør skal taka bóltin, og so smýgur Debus Danielsen sær í millum og leggur bóltin í netið.

Skála sleppur tó ikki trýstinum eftir hetta, men B36 raknar við, og eina løtu sær tað út sum um, at liðini bæði veruliga vilja vinna dystin.

Tað endaði tó við javnleiki. B36 var annars so nær við sum teir kundu í yvirtíðini, men skoti frá Santos brast á tvørtræið.

### Í lagi

Soleiðis endaði dysturin í Gundadali við javnleiki. B36 hevði verið oman á stóran part av dystinum, men seinasta korterið eigur Skála rós uppiborið fyri, og tí var tað eisini í lagi, at liðini býttu stigini sína millum.

## Finalan sat í beinunum

Jóhan V. Gunnarsson var millum frægastu B36-leikararnar í gjár, og hann heldur, at finalan hevði sína ávirkan á dystin.

– Finalan kann hava havt sítt at siga í dystinum í gjár. Tað eru bert fáir dagar síðani vit spældu hana, og vit vóru nokkso tungir nú, sigur Jóhan.

Men hóast tung bein so sat B36 nokkso trygt á tí, til tað bara restaði eitt korter eftir, men tá glapp so.

– Tað kann sjálvandi vera finalan, sum spældi inn har, men vit gera eisini nakrar útskiftingar. Fróði og Sylla fara báðir út og teir eru berandi kreftir á liðnum, og tað merkja vit eisini, tá teir ikki eru har, sigur Jóhan V. Gunnarsson.

## Onki at spæla fyri

Skála hevur onki at spæla fyri, og Alexander Johansen viðgongur eisini, at hetta hevði sína ávirkan á dystin.

– Vit hava onki at spæla fyri longur, og eg haldi eisini at okkara avrik í gjár var merkt av tí.

Alexandur sigur, at sjálvandi fara teir altíð eftir tí, teir kunnu fáa, men at tað ikki altíð er so lætt at seta seg upp til uppgávuna.

– Pauli fór út í hálvleikinum og Bogi kom inn, og vit løgdu um til at spæla 4-4-2. Tað riggaði ikki heilt, men so tá Bjarni og eg vórðu tiknir út, og Debus og Bárður komu inn, riggaði kantspælið betri, samstundis sum B36 slakkar eitt sindur av, og so fingu vit javna, sigur Alexandur Johansen.